# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Amerikanararnir tóktust sansaleysir og skutu eftir øllum, sum fyri var*

*afghanskur embætismaður*

# Hermenn skutu eftir sivilfólki

**Minst átta fólk doyðu, tá amerikanskir hermenn skutu eftir sivilfólki. Amerikanararnir siga, at hermenninir skutu í sjálvverju.**



*Hesin bilurin varð gjøgnumgataður av kúlum.*

Teir amerikonsku hermenninir fóru at skjóta, eftir at ein sjálvmorðsbumbumaður hevði sprongt eina bilbumbu nærhendis einum bilafylgi hjá amerikanska herinum uttan fyri býin Jalalabad. Fólk, sum sóu tilburðin, siga, at teir amerikonsku hermenninir kvikaðu sær burtur, meðan teir skutu frá hond, og at fleiri fólk, sum gingu fram við vegnum, vórðu rakt. Sambært afghonsku myndugleikunum doyðu átta sivilfólk.

– Vit halda fyri vist, at fleiri teirra doyðu av skotum frá monnum, sum skutu eftir okkum, sigur talsmaðurin hjá amerikanska herinum í Afghanistan.

Men tað halda afghanar ikki. Ein leiðandi embætismaður í Shinwar-landspartinum segði við útlendsk tíðindafólk, at teir amerikonsku hermenninir tóktust sansaleysir og skutu eftir øllum, sum fyri var.

### Oyðiløgdu myndir

Tveir amerikanskir myndamenn, sum arbeiða hjá tíðindastovuni AP og sjónvarpinum AP Television, greiddu í gjár frá, at amerikonsku hermenninir tóku myndatól teirra og oyðiløghdu myndirnar av tilburðinum. Leiðslan í AP kunngjørdi seinni, at hon fer at senda myndugleikunum eitt mótmæli ímóti framferðini hjá hermonnunum.

Útlendskir eygleiðarar í Afghanistan siga, at tilburðurin uttan fyri Jalalabad kann fáa álvarssamar avleiðingar, tí líknandi tilburðir hava fyrr elvt til umfatandi mótmæli og harðskap.

# Fýra mió. irakar flýddir frá húsi og heimi

**Hvønn mánað flýggja næstan 50.000 irakar frá húsi og heimi orsakað av ófriðinum.**

Sambært ST-hákommiserinum í flóttafólkamálum eru næstan fýra mió. irakar flýddir heiman síðani innrásina í 2003, og hann ber ótta fyri, at talið fer at veksa.

– Hvønn mánað flýggja millum 40.000 og 50.000 fólk frá húsi og heimi, og heldur hetta fram, verða umleið 2,3 mió. irakar flóttafólk í egnum landið, áðrenn hetta árið er runnið, segði Antonio Guterres, tá hann vitjaði skrivstovuna hjá Arabisku Samgonguni í Kairo um vikuskifti.

Hann legði afturat, at umleið tvær mió. irakar eru flýddir úr Irak síðani innrásina.

– Hetta er tann størsta flóttafólkabylgjan í Miðeystri síðani 1948, segði Guterres og sipaði til, tá Ísrael varð stovnað, og palestinar í milliónatali noyddust at flýggja.

ST-flóttafólkakommiserurin heitti á tey arabisku londini um at vera meiri virkin í altjóða kjakinum um flóttafólkamál. Hann vísti á, at meginparturin av heimsins flóttafólkum eru muslimar.

## STUTT SAGT

### Blaðstjóri myrdur

Ein irakskur blaðstjóri varð skotin uttan fyri hús síni í einum sunnimuslimskum býarparti í Bagdad í gjár. Fólk, sum sóu tilburðin, hava greitt frá, at nakrir menn royndu at burturflyta blaðstjóran, men at teir skutu hann, tá hann gjørdi mótstøðu. Mohan al-Dhaher var blaðstjóri á blaðnum al-Mashriq. Hóast hann var shiamuslimur, búði al-Dhaher í einum sunnimuslimskum býarparti, men hann var ein hóvligur maður og hevði góð viðurskifti við grannarnar, skrivar AP. Síðani innrásina í 2003 eru minst 150 tíðindafólk myrd í Irak.

### Kina dubbar

Kinesiska stjórin hevur samtykt at brúka 17,8 prosent meiri til hernaðarmál í ár enn í fjør, og tað merkir, at nú fara 7,5 prosent av fíggjarlógini til hernaðarmál. Í krónum merkir tað, at Kina fer at brúka næstan 260 mia. krónur til hernaðarmál í ár. Í seinastuni hevur kinesiska hermegin fingið millum annað nýggj flogfør, nýggjar rakettir og nýggj herskip. Eygleiðarar siga, at kinesiska avgerðin at brúka meiri pengar til hermegina fellur neyvan í góða jørð í USA, tí herfyri fanst Dick Cheney, varaforseti, at kinesisku stjórnini, tí hon økir hernaðarútreiðslurnar. Kinesiska játtanin til hernaðarmál er kortini sera lítil samanborin við ta amerikonsku, sum er einar 2.700 mia. krónur, og tá eru útreiðslurnar til kríggini í Irak og Afghanistan ikki við.

### Stjórnin frá

Stjórnin í Kuwait kunngjørdi í gjár, at hon leggur frá sær. Avgerðin kom, eftir at eitt uppskot um misálit á ráðharran í heilsumálan var komið í tjóðartingið. Alt bendi á, at tingið fór at samtykkja uppskotið, og tí valdi stjórnin at leggja frá sær fyri at sleppa undan atkvøðugreiðslu um uppskotið. Heilsumálaráðharrin hevur staðið fyri skotum í seinastuni, eftir at fleiri fólk eru deyð undir viðgerð á sjúkrahúsunum. Harafturat hevur tað víst seg, at fíggjarligt og umsitingarligt óskil valdar innan heilsuverkið, skrivar Reuters.

### Sveis gjørdi innrás í Liktinstein

Tað kundi endað sum ein diplomatisk kreppa, tá ein deild hjá sveisiska herinum viltist inn í grannalandið Liktinstein nú eina náttina. Teir 170 hermenninir vóru á venjingarferð, men í myrkrinum viltust teir og fóru inn um markið til Liktinstein. Sveisiska stjórnin hevur biðið tað lítla grannalandið um umbering, og myndugleikarnir har hava góðtikið umberingina.

– Eingin her legði til merkis, at fremmandir hermenn vóru komnir um markið, so hetta hevði ikki so nógv upp á seg, sigur talsmaðurin hjá myndugleikunum í Liktinstein.